## Hávur til biogass

Grønlandshávurin kann ikki brúkast sum mannaføði og hevur heldur ikki nakað serliga gott orð á sær. Men nú er líkt til, at hann kortini kann gera gagn. KNR veit at siga, at sambært kanningum kann grønlandshávurin brúkast sum biogass. Kommunan í Uummannaq arbeiðir við einari verkætlan um at brúka biogass til orkuframleiðslu., og kanningar vísa, at biogass frá fiskaslógvi og grønlandshávi kann útvega 13 prosent av orkunýtsluni í kommununi.



## Sea Shepherd ger um seg

Tveir menn hjá felagsskapinum Sea Shepherd fisgu skaða, tá teir royndu at órógva japonsk hvalaveiðiskip, sum royndu eftir stórhvali í suðurhøvum einar 1.700 fjórðingar sunnan fyri avstralsku oynna Tasmania. Formaðurin í Sea Shepherd, Paul Watson, sigur við tíðindastovuna AP, at eitt av teimum japonsku skipunum setti spulislangurnar á menninar hjá Sea Shepherd, tá hesir sigldu at hvalabátinum. Hann vil eisini vera við, at japanararnir tveittu ymsar lutir eftir gummibátinum hjá Sea Shepherd.

# millíónir á Selatrað

# Framkomin depil við øllum hentleikum



*Heildaryvirlit yvir nýggju skótaleguna. Í tekstinum verður meiri nágreiniliga greitt frá, hvussu depilin er skipaður*

SKÓTALÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sum tað sæst á yvirlitsmyndini, verður talan um ein umfatandi og framkomnan skótadepil, sum ætlanin er at gera á Selatrað.

Niðast høgrumegin á myndini sæst eitt nýtt, stórt leguhús til yvir 120 fólk. Ovast í vinstra horni er ein Rovarasmátta, til smærri bólkar av vaksnum skótum. Økið, har Rovarasmáttan stendur á, er hagi og har fara tey at planta runnar, so at smáttan kemur at standa í einum skógarlíknandi náttúrukendum hagalendi.

ÍmillumRovarasmáttuna og miðdepilin, er ein gøta og ein rundingur, sum tey nevna Úlvadalurin. Har er ætlanin at planta framvið og at hava gøtur ímillum trøðini og eitt opið pláss í miðjuni.

Úlvarnir eru teir yngru skótarnir frá 7-12 ár.

Niðast høgrumegin er eisini ein smátta til smærri bólkar av yngru skótum, sum eru ímillum 12-16 ár. Hetta er ein smátta, sum longu er á deplinum á Selatrað.

Ferhyrnta húsið høgrumegin er Hoyløðan, men har verður ovara hæddin tikin burtur, so at sjálv løðan verður tikin burtur og at breiða oman á tann stoypta kjallaran so at tey fáa eitt skúr til útgerð at kalla undir jørð.

Wc bygningurin er mitt í myndini og hann verður verður standandi.

Runt um í myndini síggjast smáir rundingar, sum eru smærri legupláss og bálpláss og har er ætlanin at hava kranar til rennandi vatn og el.

Men miðdepilin á skótadeplinum er stóra bálplássið mitt í deplinum. Undir bálplássinum er skúr til brenni og amboð og oman á er pláss fyri einum stórum báli ella einum ella tveimum smærri bálum og á plássunum rundanum er rúm fyri nógvum fólki.



*Glaðir skótar á legu á Selatrað, men í framtíðini fáa teir enn meiri at gleðast um*